Dagført: 1. juni 2023

# Ordrafremjingarpolitikkur

## Virðisbrævaordrar

Tá Betri Banki avgreiðir tín virðisbrævaordra, verður tað altíð gjørt í samsvari við ordrafremjingarpolitikkin hjá Betri Banka, um ikki annað er avtalað við teg.

## Ordrafremjing

Tá Betri Banki avgreiðir virðisbrævaordrar, roynir Betri Banki altíð at fáa tað eftir umstøðunum besta úrslitið fyri teg. Atlit verður her tikið til prís, kostnað, skjóta avgreiðslutíð, fremjingar- og avrokningarlíkindi, umframt onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri avgreiðsluna av ordranum sambært hugtakinum "Best Execution".

## Serlig boð frá tær sum kunda

Tá tú sum kundi gevur serlig boð um ein ordra, eru tað altíð hesi boð, sum eru galdandi fyri ordran. Tá Betri Banki avgreiðir ordran eftir tínum boðum, kann ein fylgja vera, at Betri Banki ikki kann lúka skylduna um "Best Execution".

## Týdningarmikil viðurskifti í sambandi við "Best Execution"

Fyri at røkka "Best Execution" tekur Betri Banki atlit til øll viðurskifti, sum gera Betri Banka føran fyri at veita tær tað eftir umstøðunum best møguliga úrslitið viðvíkjandi samlaðu gjøldunum. Samlaðu gjøldini eru samansett av prísinum á fíggjarliga amboðnum umframt øllum útreiðslum, sum eru beinleiðis knýttar at avgreiðsluni av ordranum. Viðurskifti so sum skjótleiki, líkindi fyri at kunna avgreiða ordran, ordrastødd, ordraslag, marknaðarárin og aðrir handilskostnaðir fáa bara fyrimunarstøðu mótvegis beinleiðis prísinum og beinleiðis útreiðslunum, tá tey viðvirka til at røkka best møguliga úrslitinum, við atliti at samlaða kostnaðin.

## Handilsstøð

Tá ordrar verða avgreiddir sambært hesum ordrafremjingarpolitikki, brúkar Betri Banki eina røð av handilsstøðum, sum gera Betri Banka føran fyri at røkka so góðum úrsliti sum til ber eftir umstøðunum. Yvirlit yvir týdningarmiklastu samstarvsfelagarnar/ handilsstøðini hjá Betri Banka er tøkt á betri.fo/samstarv.

## Handil uttan um ein reguleraðan marknað ella MHF

Fyri at røkka "Best Execution" kann Betri Banki velja at avgreiða tín ordra uttan um ein reguleraðan marknað/ MHF (Multilateral Handels Facilitet). Tá tú góðtekur henda ordrafremjingarpolitikkin, góðtekur tú samstundis, at Betri Banki kann avgreiða tínar ordrar uttan um ein reguleraðan marknað/MHF.

## "Execution only"

Tú kanst handla fylgjandi virðisbrøv, uttan at Betri Banki veitir tær ráðgeving um íløguna, og uttan at Betri Banki metir, um tænastan ella veitingin er gagnlig fyri teg:

- partabrøv, sum kunnu handlast á Nasdaq OMX Keypmannahavn ella samsvarandi reguleraðum marknaði í Danmark, í ES, í londum, sum ES hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum ella samsvarandi marknaðum í triðjalondum
- statslánsbrøv, realkredittlánsbrøv, statsskuldarprógv og onnur skuldaramboð, sum ikki fevna um avleidd amboð
- partar í donskum íløgufeløgum ella samsvarandi íløgustovnum, sum eru fevndir av ES-fyriskipan 85/611/EØS

Um tú gevur serlig boð viðvíkjandi hesum virðisbrøvum, hevur Betri Banki skyldu til at avgreiða ordran sambært boðunum frá tær. Betri Banki skal tí ikki meta, um tænastan ella veitingin er gagnlig fyri teg.

## Endurmeting av ordrafremjingarpolitikkinum

Eina ferð um árið metir Betri Banki, um ordrafremjingarpolitikkurin riggar sum ætlað, og lagar politikkin til eftir tørvi. Samstundis metir Betri Banki regluliga um samstarvsfelagar/ handilsstøð, ið eru partur av hesum ordrafremjingarpolitikkinum. Á henda hátt verður tryggjað, at Betri Banki framvegis er førur fyri at veita tær best møguliga tænastu og tryggja tær best møguliga úrslitið. Tú fært ikki serliga fráboðan um broytingar í ordrafremjingarpolitikkinum. Tí verður mælt til, at tú regluliga kunnar teg um møguligar broytingar á heimasíðuni hjá Betri Banka. Broytingar og dagføringar eru galdandi frá og við tí degi, tá hesar eru almannakunngjørdar á heimasíðuni hjá bankanum.